## Ronaldo á beinkinum

Cristiano Ronaldo sat á beinkinum, tá ið Real Madrid leygarkvøldið spældi dyst í sponsku landskappingini. Real Madrid legði seg á odda 1-0 í fyrra hálvleiki, og eftir steðgin kom Ronaldo á vøllin. Og tað gjørdist heimsins dýrasti fótbóltsspælari, sum fekk seinasta orðið í dystinum, tí hann skoraði til úrslitið 3-0.



## Cieslewicz skoraði

Hvidovre spældi í gjár ímóti Skive í næstbestu donsku fótbóltsdeildini. Ein av spælarunum á liðnum hjá Hvidovre er Lukasz Cieslewicz, sum hevði ein part av sínum fótbóltsuppvøkstri í VB. Lukasz hevur áður spælt fyri Brøndby, men hevur seinasta árið verið sáttmálabundin við Hvidovre. Hvidovre vann dystin ímóti Skive 3-0, og eitt av málunum hjá gjørdi Lukasz Cieslewicz.

## Bestubitar úr 3. hálvleiki

**Ein partur av triðja hálvleiki á Rás2 eru SMS-boð frá lurtarunum, sum á hendan hátt kunnu geva sítt íkast til tosið um dystirnar, sum hava verið. Besta SMS'ið hvørt umfarið í september fær eitt gávukort upp á 500 krónur frá Carello, og er hetta SMS'ið prentað ovast í røðini niðanfyri**

*»Er grøv nr 13 a nyggju ki fløguni?«*

*»Er Rogvi Jacobsen slettadur i greinasavninum hja Nordlysinum?«*

*»Faroe FIVE spaeldu til IF-dans i gjar«*

*»Tad eydnadist ikki àlopinum at TAMBA verjuna hjà AB«*

*»Ur Klaksvìk frættist at Høgni Madsen er til sølu, einar kravid er at gjaldast skal vid KORTID«*

*»Oli olsen hevur skift navn til goali goalsen«*

*»Mjólkin druknadi rabarbugreytin i dag. Go B36 Go!«*

*»Tad er altso ov nògv, at tvey lid flyta beinleidis nidur. Heri, hetta er ov galid! Hetta mà takast upp og broytast!«*

*»Tað er ein sterkur gummi(beina) luktur yvir hb-húsinum«*

*»Hvì syngja b36'arir "he-r er tad stutligt, her er tad gott" ta teir liggja nr 8?«*

# Botnurin um at skrædna



Tað eydnaðist ikki HB at vinna meistaraheitið sunnudagin, men spurningurin er nú mest av øllum nær – og ikki um

Mynd: Álvur Haraldsen

**Tapini hjá KÍ og 07 Vesturi saman við sigrunum hjá ÍF og B36 bera við sær, at botnstríðið, sum leygarmorgunin sá so sera spennandi út, nú er um at skrædna**

Tað er um tað mundið, at føroyski




Jákup Mørk

fótbóltsheimurin kann venja seg við tankan, um at KÍ ikki longu hevur umboðan í fremstu mansdeildini.

Eitt er, at talan var um óhugnaliga týðandi uppgerð fyri klaksvíkingar, tá teir vitjaðu í Fuglafirði. Hana hevði KÍ illa ráð at tapa, men tað gjørdu teir – við manér.

0-5 sekkurin var í veruleikanum ein mest sum fullkomin eyðmýking av stoltu fótbóltstraditiónunum hjá KÍ, sum við vána málúrtøkuni í huga nú skal toga sjey stig inn á B36, um Vodafone-tilveran skal bjargast. Og við útidystum móti nummar eitt og tvey millum seinastu fýra uppgávurnar tykist tann uppgávan nú at vera mest sum óyvirkomulig.

### Mentala gearingin

Hóast KÍ hevur verið í tungum sjógvi størsta partin av árinum, so tykist ein trupulleiki hjá liðnum vera, at spælararnir als ikki eru til reiðar at geva tað, sum krevst fyri at yvirliva í einum botnstríði.

Seinastu umførini hevur KÍ spælt at kalla lagnudyst móti ávíkavist B36 og ÍF, men í hvørgum av førunum hava klaksvíkingar verið til reiðar at tackla uppgávuna.

Tá tykist meira sannlíkt, at 07 Vestur heldur lív í sínum vónum, tá teir komandi dystirnar spæla móti ÍF og síðani júst KÍ, áðrenn endaði verður við teimum báðum ovastu liðunum. Eisini tí at júst mentala gearingin er stillað rætt inn í Vágum, har succés-kriteri'ið alla tíðina hevur verið yvirliving, og har spælararnir tí medda eftir hesum, heldur enn at óttast eina fiasko.

Hjá B36 hevur mentala gearingin heldur ikki verið heilt tann rætta, men sigurin sunnudagin lyfti liðið hampuliga langt av vandaleið. Og meira enn nakað vísti hann eisini, hvussu stór sveiggini hava veri í avrikunum hjá B36, sum í ár hevur sveiggjað millum tað ússaliga og toppin av føroyskum fótbólti.

Fuglfirðingar hava eisini havt sínar stóru trupulleikar, og eitt tap móti KÍ hevði gjørt hesar alsjónligar aftur, men tað gjørdist nú ikki til meira enn ein hypotetiskur spurningur.

### Silvurstríðið

Mest spennandi parturin av landskappingini tykist nú vera, hvussu býtið av heiðursmerkjum skal vera.

Hesa ferð var tað B68, sum eina løtu legði seg upp á silvurplássið, men enn er so einki avgjørt í tí stríðnum. Enntá tykist AB nú at ota seg alsamt nærri, og við verandi gongdini hjá argjamonnum og óstøðugu avrikunum hjá sub-toppinum í mentu, er kanska slettis ikki so óhugsandi, at argjamenn koma heilt nær onkrum, ið var mest sum óhugsandi undan kappingarbyrjan.

Komandi trý umførini innihalda eisini øll internar uppgerðir millum B68, Víking, EB/Streym og NSÍ, og so fæst at vita, um heiðursmerki verða egg ella ungi.

Úr gulli verða tey so neyvan hjá nøkrum øðrum enn HB. Tað kiksaði hesaferð, men stigatalvan og komandi umførini siga, at ferðslan úr Havn næsta sunnudag verður ovurhonds stór, tá HB í Fuglafirði skal spæla fyri at staðfesta gullið.

**Seinastu umførini**

| | | | |
|---|---|---|---|
| **24. umfar** | | | |
| 16-sep | HB | - | AB |
| 16-sep | EB/Streymur | - | B36 |
| 16-sep | NSÍ | - | Víkingur |
| 16-sep | 07 Vestur | - | ÍF |
| 16-sep | B68 | - | KÍ |
| **25. umfar** | | | |
| 20-sep | B36 | - | NSÍ |
| 20-sep | AB | - | EB/Streymur |
| 20-sep | ÍF | - | HB |
| 20-sep | KÍ | - | 07 Vestur |
| 20-sep | Víkingur | - | B68 |
| **26. umfar** | | | |
| 27-sep | HB | - | KÍ |
| 27-sep | EB/Streymur | - | ÍF |
| 27-sep | NSÍ | - | AB |
| 27-sep | Víkingur | - | B36 |
| 27-sep | B68 | - | 07 Vestur |
| **27. umfar** | | | |
| 03-okt | B36 | - | B68 |
| 03-okt | AB | - | Víkingur |
| 03-okt | ÍF | - | NSÍ |
| 03-okt | KÍ | - | EB/Streymur |
| 03-okt | 07 Vestur | - | HB |